Fleiri rásir - einki roks



*Denzel Washington vann oscar-virðisløn fyri sín høvuðsleiklut í Training Day*

# Training Day

**Á TV3 sunnukvøldið kl. 20.00**



*Lærumeistarin, Alonzo Harris (Denzel Washington), og næmingurin, Jake Hoyt (Ethan Hawke)*

Hvønn tann einasta dag er harðligt og blóðugt stríð á gøtunum í USA. Við lógarinnar merki stríðist tann garvaði narko-politisturin Alonzo Harris (Denzel Washington). Men hansara arbeiðshættir eru sera ivasamir. So, tá tann ungi samvitskufulli Jake Hoyt (Ethan Hawke) verður settur at arbeiða saman við Alonzo, er tað skjótt at ósemja tekur seg upp. Jake er enn í starvsvenjing og hevur fingið júst ein dag, og ikki meiri enn tað, at prógva sítt dugnasemi. Í eitt døgn kemur Jake so líðandi inn í brotsmannaheimin har Alonzo dagliga arbeiðir. Í hesum stutta tíðarskeiðinum seta teir báðir lív og yrki í váða fyri at verja teirra egnu tulking av lógini.

# Ein fremmandur uttan navn

**Á DR1 í kvøld kl. 22.30**



*Clint Eastwood er maðurin uttan navn*

Ein fremmandur við løddum revolvarum ríður inn í býin. Ímeðan eru tríggir ørligir skotglaðir bandittar á vág og teir hava svorið hevnd á íbúgvunum í býnum. Ræðslan merkist í býnum, og íbúgvarnir vóna at hesin fremmandi er komin fyri at hjálpa teimum. Teir tríggir bandittarnir eru júst komnir úr fongsli, har teir hava sitið leingi, og íbúgvarnir hava stóran lut í hesum. Á sinni fingu íbúgvarnir hesar tríggjar at seta ein ráðaríkan embætismann uppá pláss, afturfyri skuldu teir fáa stuðul og nokk av pengum. Men, tá hetta var gjørt tóku íbúgvarnir stuðul sín til teir tríggjar aftur, so blivu teir fangaðir og tveittir í fongsul. Nú hava teir svorið hevnd og ríða ímóti býnum. Íbúgvarnir vóna at tann fremmandi skal verða teimum ein bjarging, men so skal kortini ikki verða. Maðurin uttan navn er í veruleikanum ein náðileysur hevndarmaður, ið hevur síni heilt serligu og blóðigu ørindi í hesum býnum.